# búgving



...ntøka enn útreiðsla, heldur Kári á Rógvi

útreiðslum og øðrum ber til at taka bæði longri, betri og bíligari skeið í Føroyum. Við at fáa framtíðar arbeiðsmegina nærri knýtta fáa bæði almenn og privat arbeiðspláss fleiri og betri starvfólk.

Tá gongd fyrst er komin á útbúgving og gransking fara eisini fleiri fak og heilar útbúgvingar at standa fólki í boði við tað 'Sameinda Setrið' og helst eisini aðra hægri skúlar, tí kapping er eisini góð teirra millum.

Hetta við útbúgving sum vinnu er heldur ikki avmarkað til fólk við 'fínum útbúgvingum'. Øll kunnu læra at gera arbeiðið betur, og tað liggja framleiðsla og vinnur í at útbúgva tey til tað, um tað so er frálæra í stóra koyrikortinum, í teldu, í máli ella í slíkum, sum gevur umvegis og óbeinleiðis búskaparligan vøkstur sum list og ítróttur.

Vit skulu halda fram at útflyta vitan og útbúgving, men ikki við at útflyta alla rávørðuna, eins og vit nú gera.

# Allar útbúgvingarnar undir sama hatt

**Tað er fyri at fáa meiri burturúr tilfeinginum og fyri at laga útbúgvingarnar eftir altjóða støðinum og krøvunum, at politiski myndugleikin nú fer undir at umskipa bygnaðin av útbúgvingarstovnunum og at skipa útbúgvingarnar av nýggjum**

FRAMTÍÐAR ÚTBÚGVINGAR
*Jóannes Hansen*

Áhugin fyri at skipa stovnarnar av nýggjum, sum hava við víðari útbúgvingar at gera, og at tillaga innihaldið, hevur verið stórur fleiri tey seinastu árini. Tað sæst eitt nú á, at útbúgving hevur átt ikki so lítla rúmd í politiska kjakinum.

ÚBPN álitið greiddi ÚtBúgvingarPolitikkNevndin úr hondum í 1999, og fullveldislandsstýrið skipaði fyri, at álitið, sum snúði seg um gransking og útbúgving, var lagt fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis. Í høvuðsheitum snýr álitið seg um møguleikarnar at mennast og fáa útbúgving og um at skapa eitt samfelagsligt vitanarstøði, ið millum annað kann vera grundarlag undir skilagóðum avgerðum, sum tryggja varandi loysnir, verður sagt á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum.

Tey seinastu árini hevur útbúgvingarskipanin og víðari útbúgvingar fleiri ferðir verið viðgjørt í Løgtinginum. Eitt nú hava tað tvey tey seinastu árini verið fimm skrivligir fyrispurningar um útbúgvingar til landsstýrismannin í Mentamálum. Annika Olsen hevur spurt um føroysku luttøkuna í Bologne tilgongdini, Finnur Helmsdal hevur spurt um eftirskúlar í Føroyum og um pedagogútbúgvingina, Kristina Háfoss og Heðin D. Poulsen hava spurt um gransking og løgfrøði, og Kári P. Højgaard hevur spurt um hægri útbúgving í Føroyum.

## Ætlanirnar

Á Ólavsøku segði løgmaður, at hægru útbúgvingarnar eiga at samskipast undir einum stovni ella depli.

- Skal slík samskipan gera fulla nyttu og harumframt vera í betri samljóði við samfelagstørvin er neyðugt, at Fróðskaparsetur Føroya fær nýggjan og smidligari bygnað, staðfesti løgmaður.

Útsøgnin hjá løgmanni var grundað á samgonguskjalið, og landsstýrismaðurin í Mentamálum og umsitingin hjá honum arbeiða við at fyrireika broytingarnar:

- Tað eru ein innara og ein uttara orsøk til, at vit eru noydd at broyta bygnað og innihald í útbúgvingunum. Útbúgvingarnar og stovnarnir eru komnir so við og við. Nú royna vit at síggja hetta økið sum eina heild og at finna loysnir, sum bera við sær, at menniskjaliga og fíggjarliga orkan verður betri gagnnýtt, enn hon higartil hevur verið, og at talan verður um størri faklig og næmingalig umhvørvi, enn talan higartil hevur verið um. Vit rokna eisini við, at hetta fer at bera betri fyritreytir fyri gransking við sær. Hin parturin er at veita føroyskum útbúgvingum og føroyskari gransking atgongd til norðurlendsku og europeisku granskingargrunnarnar, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum.

Yvirskipaða felags europeiska málið fyri víðari útbúgvingum er, at tær skulu skipast í sokallaða 3+2+3 skipanina. Tað vil siga, at fyrst skulu trý ár nýtast til BA lestur, síðani tvey ár til MA lestur og síðani trý ár til Ph.D.

## Ítøkiligi framferðarhátturin

1. januar í ár vórðu Fróðskaparsetrið og Sjúkrarøktarfrøðisskúlin samskipað við samanlegging fyri eyga. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin hevur fingið nýggja bachelorlóg, og teir fyrstu sjúkrarøktarfrøðingarnir, ið eru á bahcleorstigi, verða lidnir 1. februar 2007. Næsta stigið ætlast at vera samskipan og samanlegging av Fróðskaparsetrinum og Føroya Læraraskúla. Arbeitt verður við at gera nýggja lóg fyri Læraraskúlan, ið skal vera á bachelorstigi. Ætlanin er at leggja stovnarnar saman eftir at útbúgvingarnar á bachelorstigi eru komar í gildi.

Næsta stigið verður síðani at samskipa Fróðskaparsetrið og hægri útbúgvingarnar á Handilsskúlanum, Sjómans- og Maskinmeistaraskúlanum. Støða verður tikin til eina møguliga samanlegging seinni. Spurningurin um framtíðar tilknýti millum Granskingardepilin fyri økismenningargransking og Fróðskaparsetur Føroya verður eisini viðgjørdur. Hesin spurningurin kann í fyrstu atløgu verða loystur við eini avtalu millum ánarin av verkætlanin, leiðsluna og Fróðskaparsetrið.

## Nevndin

Í hesum døgum er landsstýrismaðurin í mentamálum við at seta eina nevnd at arbeiða skjótt við einum lógaruppskoti fyri ein føroyskan lærdan háskúla. Lógaruppskotið skal serliga viðgera endamálið, javnvágina millum gransking og útbúgving, heimildina fyri smidligum útbúgvingarhættum, og leiðslu og bygnað.

Ætlanin er, at nevndin skal senda uppskotið til hoyringar hjá øllum avvarðandi pørtum, og samstundis at kalla til fundar at umrøða uppskotið við hoyringspartarnar við tí fyri eyga, at gera endaligt uppskot aftaná hoyringsfundin.

Í nevndini, sum landsstýrismaðurin er við at seta, skulu vera umboð fyri Fróðskaparsetrið, Sjúkrafrøktarfrøðisskúlan, Læraraskúlan og við umboði fyri Mentamálaráðið.



*Útbúgvingin er týdningarmikil partur at visión 2015, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, eigur uppgávuna at standa á odda fyri ætlanunum*